UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Tórshavn, 27. mars 2023
J.nr.: 23/07565

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

**Svar upp á § 52a-fyrispurning nr. 52-071/2022 frá Eiriki í Jákupsstovu, løgtingsmanni, um dygd og stuðul til stráfóður**

*Spurningarnir vóru var soljóðandi:*

1. *Hvussu stór mongd av stuðlaðum stráfóðri hevur verið framleidd seinastu árini?*
2. *Hevur landsstýrismaðurin umhugsað at gera dygdina av stráfóðrinum til eitt atlit, sum stuðulin verður goldin út eftir?*
3. *Hevur landsstýrismaðurin umhugsað at lata upp fyri, at eisini onnur enn tey, ið fáast við vinnuligt neyta- ella seyðahald kunnu gerast partur av skipanini við stráfóðurstuðli?*

*Til spurning 1*
Í talvuni niðanfyri síggjast upplýsingar um umsóknir, nøgdir og útgoldnan stuðul seinastu fimm árini.

Á hvørjum ári verður hjá uml. 20 tilvildarliga valdum umsøkjarum kannað, um samsvar er millum umsókn og veruligu stráfóðurmongdina. Í 2022 vórðu kortini at kalla allir umsøkjarar kannaðir, og gott 100 fóðursýni vórðu tikin.

| Ár | Umsóknartal | Mongd (hoyggj, súrhoyggj og rullubyrðar umroknað til javnsett fóður í kubikkmetrum) | Mongd av stráfóðri, ið stuðul varð játtaður til (kubikkmetrar) | Útgoldin stuðul (kr. fyri kubikkmeturin) | |
|---|---|---|---|---|---|
| 2018 | 77 | 22.132 | 22.097 | 231,10 kr. | |
| 2019 | 93 | 23.723 | 23.639 | 214,90 kr. | |
| 2020 | 104 | 22.014 | 21.996 | 230,94 kr | |
| 2021 | 113 | 23.461 | 23.437 | 216,72 kr. | Gott summar |
| 2022 | 111 | 19.864 | 19.826 | 256,19 kr. | Vánaligt summar |

*Til spurning 2*
Við heimild í kunngerð um stuðul til landbúnaðin hevur landsstýrismaðurin møguleika at treyta stuðulin av stráfóðurdygdini, t.e. góðskukrøv frá Búnaðarstovuni. Búnaðarstovan arbeiðir við at finna eina verkligt skynsama loysn, so stuðulin kann vigast eftir dygdini á stráfóðrinum. Í hesum sambandi hevur Búnaðarstovan, saman við stráfóðurkanningunum í 2022, tikið sýni til eina fóðuranalysu. Slíkar fóðuranalysur eru kostnaðarmiklar, og roknast má við einum kostnaði upp á 100-125.000 kr. um árið, skulu slíkar kanningar brúkast at staðfesta dygd á stráfóðri. Hetta verður ikki mett at vera ein skynsom loysn, men Búnaðarstovan arbeiðir víðari við málinum.

*Til spurning 3*
Búnaðarstovan hevur, eins og ávísir bøndur, víst á, at tað helst er skilagott at broyta skipanina við stráfóðurstuðli soleiðis, at tað ber til at framleiða stráfóður at selja uttan at hava djór. Hetta hevði helst eggjað til, at størri partur av bønum varð brúktur til at fáa meira av føroyskum stráfóðri til vegar, og tá verður komið málinum um, at stráfóður í mestan mun skal vera føroyskt, munandi nærri.

Í landbúnaðarpolitikkinum, sum verður gjørdur í løtuni, verður eisini stuðulin til stráfóður viðgjørdur, og endamálið er – eins og frammanundan – at fáa so nógv dygdargott føroyskt stráfóður sum gjørligt. Leggjast kann afturat, at í uppskotinum til løgtingsfíggjarlóg fyri 2023 er skotið upp at hækka stráfóðurstuðulin við einari knappari millión.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, 27. mars 2023

**Høgni Hoydal**
landsstýrismaður